## Hevði lagt Estoniu

Fyrrverandi svenski sjóferðslueftirlitsmaðurin Bengt Erik Stenmark sigur nú, at hevði hann fingið boð um brekini við ferjuni Estoniu, hevði hann givið reiðarínum boð um at leggja skipið.

Vanlukkukvøldið royndu svenskir eftirlitsmenn at fáa fatur á Bengt Erik Stenmark, sum var á ráðstevnu í Íslandi, men tað eydnaðist teimum ikki at fáa samband við hann. Svensku eftirlitsmenninir, sum vóru í Tallin í Estlandi, høvdu funnið fimm brek umborð á Estoniu, sum lá við bryggju har, men teir høvdu ikki myndugleika at leggja skipið. Nakrar tímar seinni sakk Estonia. Bengt Erik Stenmark sigur, at høvdu eftirlitsmenninir í Tallin fingið fatur á sær og greitt frá brekunum við ferjuni, hevði hann sýtt henni at fara frá bryggju hetta kvøldið.

Frágreiðingin, sum teir svensku eftirlitsmenninir skrivaðu eftir at hava kannað Estoniu í havnini í Tallin, vísti á 17 brek við ferjuni. Fimm teirra vóru so álvarssom, at ferjan átti ikki at fingið loyvi at fara frá bryggju.

## USA hevur lykilin

Skulu viðurskiftini millum USA og Norðurkorea fáast aftur í rættlag, eru tað amerikanararnir, sum skulu slaka. Tað sigur norðurkoreanska stjórnin, sum vil vera við, at tað er USA, sum hevur lykilin til at loysa kreppuna.

- USA eigur at vísa politiskan vilja til at broyta tann fíggindaliga sinnaða politikkin ímóti Norðurkorea, tí einans á tann hátt ber til at loysa ósemjuna, so altjóða samfelagið aftur kann kenna seg trygt, stóð í einari kunngerð frá norðurkoreansku stjórnini í gjár.

Týsdagin settust amerikanskir og norðurkoreanskir embætismenn við samráðingarborðið í Beijing í einari roynd at loysa ósemjuna um ta norðurkoreansku kjarnorkuverkætlanina. Ruusar hava ávarað um, at viðurskiftini á Koreanesinum eru sera spent, og at okkurt munagott má koma burtur úr samráðingunum, skal sleppast undan einari vanlukku.

## Rakar franskar vørur

Amerikansku hóttanirnar um at revsa Frakland fyri mótstøðu tess ímóti krígnum í Irak eru nú farnar at gera vart við seg, og altsamt fleiri franskar fyritøkur kæra seg um, at tær kenna avleiðingarnar.

Eisini franskar fyritøkur í USA kenna sviðan av fronsku krígsmótstøðuni. Ein fyritøka í New York, sum innflytir franskt vín, sigur, at sølan í mars var eina hálva millión dollarar minn enn vanligt, og ein onnur fyritøka, sum innflytir innbúgv úr Fraklandi til USA, kærir seg um, at sølan er minkað 30 prosent.

Vínfyritøkan í New York hevur skrivað Jacques Chirac, forseta bræv, har hon biður forsetan gera sítt til at bøta um viðurskiftini við USA. Nógv bendir eisini á, at franska stjórnin roynir at tekkjast amerikanarunum. Í hvussu er hevur Frakland rættiliga óvæntað tikið undir við amerikanska uppskotinum um at seta ST-tiltøkini ímóti Irak úr gildi.

## Norðmenn størst lønarhækking

Ein stovnur, sum hevur eftirlit við lønarvøkstrinum í Evropa, sigur í einari nýggjari frágreiðing, at norsku løntakararnir vóru teir, sum høvdu teir størsta reallønarvøksturin í fjør.

Frágreiðingin sigur, at reallønarvøksturin var 4,7 prosent í Noregi í fjør, og tað var nógv meiri enn í eitt nú ES-londunum. Til sammetingar nevnir stovnurin, at reallønarvøksturin í Svøríki var 1,0 prosent í fjør, í Finnlandi var hann 0,3 prosent, og í Danmark var als eingin reallønarvøkstur, stendur í frágreiðingini. Næststørsti vøksturin í Evropa var í Luxenbourg, har hann var 2,2 prosent.

Sambært sáttmálunum fingu norðmenn 5,5 prosent lønarhækking í fjør, meðan meðal lønarhækkingin í Evropa var 3,5 prosent. Ein orsøk til tann lutfalsliga stóra vøksturin í norsku reallønini var, at meirvirðisgjaldið á matvørum lækkaði í Noregi í fjør, samstundis sum prísvøksturin var ógvuliga lítil.

# SARS er vandameiri enn eyðkvæmi og Saddam Hussein



*SARS-virusið er ein størri hóttan ímóti Vesturheiminum, enn Saddam Hussein nakrantíð var, sigur ein enskur virusserfrøðingur*

**SARS-virusið er vandameiri enn eyðkvæmi og onnur virussløg, tí tað breiðir seg lættliga og sera skjótt.**

SARS
*Árni Joensen*

- Kanska var Saddam Hussein vandamikil fyri Vesturheimin, men vit kunnu í øllum førum staðfesta, at SARS-virusið er ein munandi størri hóttan, enn irakski leiðarin nakrantíð hevur verið.

Tað sigur enski virusserfrøðingurin Patrick Dixon. Hann vísir á, at SARS breiðir seg sera skjótt. Eru 1.000 fólk smittað í einum býoi, kunnu vit rokna við, at talið er tvífaldað eftir fjúrtan døgum, sigur hann. Var talan um eyðkvæmi, hevði tað tikið tvey ár, áðrenn talið á smittaðum varð tvífaldað, sigur Patrick Dixon.

Hann starvast á London School of Economics, men er útbúgvin lækni og hevur í fleiri ár kannað smittusjúkur og teirra ávirkan. Hann heldur, at politikararnir eiga nú at síggja vandan við teirri nýggju sjúkuni.

- Hetta er ikki longur bara eitt mál hjá heilsumyndugleikunum í teimum einstøku londunum. Leiðararnir í Vesturheiminum eiga at seta seg saman fyri at finna eina felags mannagongd fyri, hvussu sjúkan skal basast, sigur Patrick Dixon.

Sjálvur heldur hann, vandin fyri, at SARS kann gerast ein heimsumfatandi umfarssjúka er stórur.

- SARS breiðir seg frá einum persóni til annan, og eingin hevur nakran heilivág til at forða hesum. Ein kann verða smittaður uttan at hava havt nakað samband við smittuberan, tí smittan er virkin í 24 tímar. Tað ber als ikki til at samanbera SARS við eyðkvæmi. Vandin fyri at fáa eyðkvæmissmituna er so lítil, at tú kanst fáa blóð frá einum HIV-smittaðum heilar 200 ferðir uttan at fáa smittuna. Tá vit tosa um SARS, er myndin ein heilt onnur. Tær nýtist bert at seta teg í ein stól, sum ein SARS-smittaður sat í dagin fyri. Tað er nóg mikið, sigur Patrick Dixon.

# Hermenn og tíðindafólk ræna í Irak

**Tollararnir í fleiri amerikanskum floghavnum hava lagt hald á pengar, málningar og annað, sum hermenn og tíðindafólk hava rænt í Irak.**

IRAK-KRÍGGIÐ
*Árni Joensen:*

Tað største kvettið gjørdu tollararnir í Dulles-floghavnini í Washington, tá teir komu fram á heilar tólv málningar umframt fleiri aðrar virðismiklar lutir, sum stavaðu úr Irak, og sum ein av teknikarunum hjá sjónvarpsstøðini Fox hevði tikið heimaftur við sær.

Amerikansku tollararnir siga, at málningarnir hingu í einari av borgunum hjá Saddam Hussein, og teknikarin er nú skuldsettur fyri smugling og fyri at hava logið fyri myndugleikunum. Harafturat er vandi fyri, at hann missir arbeiðið.

Samstundis hava amerikansku hernaðarmyndugleikarnir illgruna um, at fýra amerikanskir hermenn hava stolið fleiri hundraðtúsund dollarar í Bagdad. Sambært sjónvarpinum CNN funnu hermenninir pengarnar undir einari húsarannsókn heima á nøkrum av medarbeiðarunum hjá Saddam Hussein.

Eisini er ein amerikanskur hermaður lagdur undir at hava smuglað fleiri gyltar Kalashnikov-byrsur úr Irak.

Byrsurnar vórðu funnar í Heathrow-floghavnini í London, og á pappírunum stóð, at tær skuldu til eina herstøð í amerikanska statinum Georgia. Amerikansku myndugleikarnir halda, at ein av teirra hermonnum hevur verið uppi í málinum, og tað verður nú kannað.

Samstundis hava hernaðarmyndugleikarnir boðað frá, at teir umhugsa at biðja ta serligu hernaðarløgregluna kanna viðførið hjá øllum teimum amerikansku hermonnunum, sum koma aftur úr Irak.

Tað eru ikki bert hermenn, sum royna at leggja inn undir seg aftan á kríggið í Irak. Umframt teknikaran hjá Fox hava amerikansku tollararnir skuldsett fimm tíðindafólk fyri at hava roynt at smuglað virðislutir úr Irak til USA. Millum annað hevði ein tíðindamaður hjá blaðnum Boston Herald ein irakskan málning í viðførinum, tá hann kom heimaftur.

Amerikansku myndugleikarnir leggja dent á, at eingin av teimum stolnu lutunum stavar frá tí stóra fornminnissavninum í Bagdad, sum varð illa herjað av ránsmonnum.





# Mannarættindi hava vánalig kor

**Í gjár endaði tann 59. ST-ársfundurin um heimsins mannarættindi. Tey, sum halda eitt vakið eyga við mannarættindunum, halda, at tað gongur ikki tann rætta vegin, heldur tvørturímóti. Og ársfundinum kom lítið burturúr.**



MANNARÆTTINDI
*Árni Joensen*

Meðan amerikansk og bretsk flogfør bumbaðu Irak, sótu umboð fyri 53 lond í einum fundarhøli í Geneve og umrøddu altjóða mannarættindi. Bumburnar fingu kortini ikki fundarfólkið at seta viðurskiftini hjá irakska sivilfólkinum á dagsskránna.

Tað er tí ikki Irak, sum stendur eftir sum tað, ið hendi á fundinum hesaferð. Heldur er tað ein jánkaslig samtykt um mannarættindini á Kuba. Costa Rica legði fram eitt uppskot, har sagt varð, at altjóða samfelagið stúrdi fyri gongdini á Kuba, og at teir politisku fangarnir har eiga at verða latnir leysir alt fyri eitt. USA tók undir við uppskotinum, men meirilutin av teimum 53 londunum feldi tað.

Ístaðin samtykti fundurin eitt annað uppskot, sum Peru, Nicaragua og Uruguay løgdu fram saman við Costa Rica. Í tí stóð, at kubansku myndugleikarnir eiga at loyva umboðum fyri altjóða mannarættindanevndina at vitja landið. Men hesum kemur einki burturúr, tí kubanski leiðarin, Fidel Castro, hevur longu svarað, at umboðsmenninir sleppa ikki hagar. Hann sigur samtyktina vera uppílegging í innanhýsis kubansk viðurskifti.

### Castro nýtti høvi

Orsøkin til at Kuba gjørdist miðdepilin í orðaskiftinum í Geneve var, at kubanska dómsvaldið hevur júst dømt fleiri politisk andstøðufólk drúgvar fongsulsrevsingar. 71 andstøðufólk fingu millum seks og 25 ára fongsul, meðan tríggir menn vórðu dømdir til deyða og avrættaðir beinanvegin. Altjóða mannarættindafelagsskapir siga, at kanningarnar hjá ákæruvaldinum tóktust ógvuliga grunnar, prógvini ivasom, og verjan í rættarhølinum var so sum so.

Tey atfinningarsomu halda, at kubansku myndugleikarnir nýttu til høvi at sleppa sær av við nakrar av sínum argastu mótstøðumonnum, nú heimsins eygu vóru vend ímóti krígnum í Irak. Onnur halda, at Fidel Castro stúrir fyri einari meiri harðrendari amerikanskari kós mótvegis Kuba, tí Washington hevur ikki dult fyri, at navnið á Castro stendur á sama lista, sum Saddam Hussein stóð á. Tí valdi Castro heldur at gera bart, áðrenn tað eydnaðist amerikanarunum at skipa eina veruliga andstøðu á oynni.

Sæð við stuttskygdum eygum er tann demokratiska andstøðan á Kuba taparin í fyrsta umfari, men tað kann væl henda, at mannarættindanevndin hjá ST verður tann stóri taparin, tá saman um kemur. Tað halda í hvussu teir báðir stóru mannarættindafelagsskapirnir, Amnesty International og Human Rights Watch, sum nú rópa varskó.

### Kravdu USA uppí

Harafturat hava fleiri altjóða viðurkendir fjølmiðlar víst á, at fleiri av teimum londunum, sum eru sett at verja mannarættindini, eru millum tey fremstu, tá tað ræður um at bróta hesi somu rættindi. Tað eigur í hvussu er at elva til álvarssama umhugsan, at Libya, sum ikki júst er kent sum nakað undangonguland innan mannarættindi, situr í formansstólinum í altjóða mannarættindanevndini í hesum døgum.

Nú krevja teir stóru mannarættindafelagsskapirnir, at londini, sum hava sæti í nevndini, eiga at sópa fyri egnum durum og halda samtyktirnar um mannarættindini. Alt annað er ein háðan ímóti heimsfelagsskapinum ST og hansara grundreglum og tekur alla virðing undan felagsskapinum, siga teir.

Kríggið í Irak gjørdi, at politikkur kom uppí, tá fundurin í Geneve skuldi taka støðu til mannarættindini á Kuba. Argentinski forsetin, Eduardo Duhalde, helt tað vera dupultmoralskt at fordøma Kuba og ikki USA. Tað sama søgdu aðrir latínamerikanskir leiðarar, sum vanliga verða roknaðir sum Kuba-vinir, teirra millum Lula í Brasil og Chavez í Venezuela. Teir vildu heldur ikki fordøma Kuba og lata USA sleppa undan. Úrslitið varð, at eingin varð fordømdur.

# Smáu londini missa ávirkan í ES

**Bæði ES-nevndin og ES-tingið halda, at tey smáu limalondini í samveldinum fara at missa ávirkan, verður uppskotið um ein ES-forseta samtykt.**

ES-BYGNAÐUR
*Árni Joensen*

Tað er fyrrverandi franski forsetin, Valery Giscard d'Estaing, sum er komin við uppskotinum um eina felags forseta, ið skal koma ístaðin fyri verandi skipan við formansskapi, sum limalondini skiftast um hvørt hálvár. Giscard d'Estaing er formaður í einari nevnd, sum fyrireikar ta fyrstu grundlógina hjá samveldinum. Eftir ætlanini skal uppskotið leggjast fyri limalondini í juni.

ES-nevndin heldur lítið um uppskotið. Hon heldur, at skipanin við einum forseta afturat nevndini fer at elva til eina uppaftur størri umsiting, samstundis sum valdið hjá nevndini verður skert.

Heldur ikki ES-tingið er serliga fegið um forsetauppskotið. Har halda tey, at skipanin við einum forseta fer at skerja valdið hjá ES-nevndini og tinginum, samstundis sum tey smáu londini fara at fáa minni ávirkan.

Á toppfundinum í Athen í síðstu viku vístu 18 av teimum 25 londunum forsetauppskotinum aftur. Serliga tey smáu londini stúra fyri, at teirra ávirkan verður skerd munandi, um skipanin við skiftandi formansskapi verður tikin av.

Valery Giscard d'Estaing sigur, at tað letur seg ikki gera at varðveita skipanina við skiftandi formansskapi, tá limalondini verða 25 í tali frá 1. mai næsta ár, og hann fær stuðul frá teimum størstu limalondunum, Týsklandi, Bretlandi, Fraklandi, Italia og Spania. Giscard d'Estaing vísir á, at meirilutin av fólkinum í ES búgva í hesum fimm londunum, og tí heldur hann, at teirra áskoðan eigur at vera avgerandi.

Eftir uppskotinum skulu ríkis- og stjórnarleiðararnir velja forsetan, sum skal sita í hálvttriðja ár. Hann skal leiða og fyrireika allar toppfundir, samstundis sum hann skal vera almenna andlitið hjá ES mótvegis umheiminum. Nakað útinnandi vald fær hann tó ikki.